Vikuskiftis Sosialurin




13. februar fingu Angeleen Hellisdal og Heini Poulsen Aalborg ein son, hann vigaði 4570 gr. og var 55 cm.



Tann 28. november 2007 fekk Esther Maria hendan fitta lítlabeiggjan, ið eitur Philip Andreas. Foreldrini eru Elin og Jan Sjóstein, Keypmannahavn



17. februar bleiv Laura stórasystur hjá hesi lítlu didduni, sum eitur Lilja. Lilja var 52 cm til longdar og vigaði 3200 g. Foreldrini eita Eyðbjørg og Eyðstein Simonsen og búgva í Birkerød

**Føðingar**

13. februar fingu Rakul Enni og Steingrím Niclasen, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4000 gr.

14. februar fingu Erla Arge Jacobsen og Johnny Fisker Heinesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3350 gr.

14. februar fingu Gudny Helgadóttir og Thorvald Jacob Petersen, Argir, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3560 gr.

16. februar fingu Erla og Ingi á Smið, Kaldbak, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

20. februar fingu Haidi Blástein og Arne Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3430 gr.

**Prógv**

25. januar var Óluva B. Johannesen Tórshavn, avlærd sum ergoterapheutur á ergoterapheutskúlanum í Esbjerg.

23. januar tók Sirið Hovsgarð prógv á Københavns Pædagogseminarium.

**75 ár**

Mánadagin 18. februar *fylti* Kristianna Joensen, Leirvík 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 23. februar í Bygdarhúsinum í Leirvík har øll eru hjartaliga vælkomin. Byrjað verður kl. 19.00.

**70 ár**

Mánadagin 25. februar verður Trygvi Thomsen, Sumba, 70 ár. Hann er burturstaddur.

## Konsert í Margarinfabrikkini

**Konsert verður í Margarinfabrikkini við orkestrunum Credo og A-Larm fríggjakvøldið 22. februar kl. 21. Atgongdin er ókeypis.**

# Adventistaskúlin nýggjan skúlabygning



**Móttøka var í nýggja skúlabygninginum hjá Adventistaskúlanum seinasta fríggjadag. Bygningurin, sum hýsir næmingunum frá 1. til og við 3. flokki, varð tikin í nýtslu eftir summarferiuna**

MÓTTØKA

*Myndir: Magnus Gunnarsson*



*Janne Johnsson, skúlastjóri, og Thorbjørn Brochs, stýrisformaður í Adventistaskúlanum*



*Væl yvir hundrað fólk vóru til móttøkuna. Fremst á myndini Jónvør Christiansen, fyrrverandi stýrislimur í skúlanum, og Jan Christiansen, fyrrverandi borgarstóri í Tórshavnar kommunu*

Fríggjadagin 15. februar var móttøka í nýggja skúlabygninginum hjá Adventistaskúlanum við Hoyvíksvegin í Havn. Undir móttøkuni hildu skúlastjórin Janne Johnsson og stýrisformaðurin Thorbjørn Brochs røðu. Eisini var felagssangur og solsosangur frá Heina Lützen.

Norðsetur í Hvalvík hava bygt nýggja skúlabygningin, sum er 270 fermetrar til støddar við trimum skúlastovum, høli til heilsusystir, lærararúmi, køki, wc og goymslurúmi. Gartnarafyritøkan Hjálpirót hevur fríðkað økið uttanum skúlan. Nýggi skúlabygningurin kostar 3,3 milliónir.

Á skúlaøkinum eru nú tveir skúlabygningar. Tann fyrri sum varð tikin í nýtslu í 1966 og so hesin nýggi. Adventistaskúlin í Havn var upprunaliga privatskúli, men síðan 1. august 2003, tá fríksúlalógin kom í gildi í Føroyum, hevur hann verið fríksúli.

Adventistaskúlin er ein kristin skúli við tí grundleggjandi áskoðan, at barnið eigur at mennast bæði andaliga, likamliga og kunnskaparliga. Endamál skúlans er at hjálpa børnunum at verða góðir og gagnligir samfelagsborgarar. Eisini er skúlin eitt alternativt tilboð til næmingar og foreldur. Í løtuni ganga 107 næmingar á skúlanum.



*Hallgerð Sivertsen, fyrrverandi leiðari á skúlanum, Anna Mikkelsen úr Vestmanna og Sunneva Maria Guðmundsson, lærari á skúlanum*



*Heine Lützen, stýrislimur, og Bergur Godtfred, lærari á skúlanum*



*Lærararnir á Adventistaskúlanum, aftara rað f.v.: Bergur Godtfred, Agnieszka Lach Johannesen, Tórunn Holm, Marin Elisabeth Johannesen, Marna Hansen og Sonja Danielsen*
*Fremra rað f.v.: Janne Schantz Johnsson, skúlastjóri, Sunneva Maria Guðmundsson, Noomi Schwartsson og Kristinn Johnsson*